# Bygdarráðsfundur – stytt gerðabók

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 15.03.2021 kl. 17.30

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Ronni Hammer |
| | Eir J. Norðberg |
| | Gunnhild Mortensen |
| | Niels Olaf Eyvindsson |
| | Thorstein Thomsen |
| | Martin í Nesi |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

1. **Skriv frá Siri Næs Olsen – summarfrí á dagstovninum.**

   Søkt verður um loyvi at hava dagstovnin stongdan í viku 30 og 31, grundað á, at undanfarnu ár hava sera fá børn verið í ansing hesar vikurnar.

   **Trivnaðarnevndin 10.03.2021:**

   Nevndin mælir til framhaldandi at hava stovnin opnan alt árið – ynskir at bjóða okkara borgarum hesa tænastu.

   **Fíggjarnevndin 15.03.2021:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at fylgja tilmælinum hjá dagstovnaleiðaranum.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð við fýra atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini.

2. **Búmerki til Hvalbiar skúla.**

   Nakrir flokkar í Hvalbiar skúla hava latið inn uppskot um búmerki til skúlan.

   **Trivnaðarnevndin 10.03.2021:**

   Forkvinnan ynskir at fáa málið aftur í nevndina.

   **Avgerð:**

   Einmælt samtykt at beina málið aftur í Trivnaðarnevndina.

3. **Innkomin tilboð uppá ymiskar lýsingarlutir.**

   **Gávur til nýføðingar**:

   Innkomin tilboð:

   | | |
   |---|---|
   | Hosur – 20 pør: | kr. 2.520,00 v/MVG |
   | Bók «Ert tú har lítli fílur» - 20 stk. | kr. 1.200,00 v/MVG |
   | Suttur – 30 stk.: | kr. 600,00 v/MVG |

**Trivnaðarnevndin 10.03.2021:**
Nevndin mælir til at bíleggja vøruna sum gávu til allar nýføðingar frá 1. januar 2021 at rokna.
**Fíggjarnevndin 15.03.2021:**
Nevndin hevur sama tilmæli sum Trivnaðarnevndin.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

**Tilboð uppá lýsingartilfar:**
Trivnaðarnevndin hevur heintað inn tilboð uppá lýsingarlutir frá Innspark og Gimmix – pennar, endurskin og húgvur.
**Trivnaðarnevndin 10.03.2021:**
Nevndin mælir til at taka av samlaða tilboðnum frá Gimmix kr. 17.512,50 íalt.
**Fíggjarnevndin 15.03.2021:**
Samtykt varð einmælt at mæla til bert at taka av tilboðnum uppá endurskin frá Innspark kr. 2.500,00.
**Avgerð:**
Samtykt varð við fýra atkvøðum fyri, onki at keypa.

4. **Skriv frá borgara viðvíkjandi bátavogni.**
   Innkomið tilboð uppá bátavogn.
   **Vega- og havnanevnd 08.03.2021:**
   Nevndin hevur viðgjørt málið og vil vita, hvat ynski hjá bygdarráðnum er í mun til at hava ein bátavogn ella ikki í kommununi.
   **Fíggjarnevndin 15.03.2021:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at taka av tilboðnum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt ikki at taka av tilboðnum, men taka málið uppaftur seinni í ár, tá fíggjarætlanin fyri 2022 verður viðgjørd.

5. **Umsókn um loyvi til taðing.**
   Ætlanin er at spræna smærri nøgdir av biotøðum sambært viðlagdari taðingarætlan.
   **Tekniska nevnd 11.03.2021:**
   Nevndin mælir til at geva loyvi til taðing á matr. nr. 25a, 4a og 24a. Umsøkjarin skal halda seg til kunngerð um taðing.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

6. **Skriv viðv. matr. nr. 95a.**
   Fyri at hava givið loyvi til, at partur av matr. nr. 95a verður brúkt sum parkeringarøki, verður søkt um, at kommunan asfalterar víðari niðan og stoypir ein garð út frá fjósinum og oman við vegnum.

**Tekniska nevnd 11.03.2021**:
Nevndin mælir til, at umsøkjarin setir upp formar til garð sjálvur og avsetir ein kant framvið asfaltinum har tað steðgar, so letur kommunan tilfarið, umleið 6 kubikk betong v.m.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

7. **Innkomin tilboð uppá vindeygu til kommunuskrivstovuna:**
Innkomin tilboð:

| | |
|---|---|
| Vágs Timburhandil: | kr. 75.963,54 v/MVG |
| Grant – H-Dygd: | kr. 107.130,00 v/MVG (komið 04.02.2021) |
| Grant – H-Dygd: | kr. 78.577,99 v/MVG (komið 03.03.2021) |

**Fíggjarnevndin 15.03.2021:**
Nevndin mælir til at taka av lægsta tilboðnum frá Vágs Timburhandli kr. 75.963,54.
**Avgerð:**
Samtykt varð við fýra atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini og taka av tilboðnum frá Vágs Timburhandli.

8. **Dátuverndarlógin – val av dátuverndarfólki.**
Í sambandi við nýggju Dátuverndarlógina, ið kom í gildi 1. januar 2021, er álagt at velja dátuverndarfólk. Kommunufelagið hevur fingið tilboð frá fýra ymiskum veitarum:

| | |
|---|---|
| Formula: | kr. 2.900,00 pr. mánaða |
| Faroe Law: | kr. 2.500,00 pr. mánaða |
| Eirin: | kr. 1.250,00 pr. mánaða |
| Nema: | kr. 999,00 pr. mánaða |

**Fíggjarnevndin 15.03.2021:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Nema.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

9. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.30

Janus Thomsen Ronni Hammer Eir J. Norðberg Niels Olaf Eyvindsson

Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen Martin í Nesi